## Sýta fyri at keypa upsa



Ein fiskakeypari í Ryfylke í Noregi hevur nú sýtt fyri at keypa upsa. Fiskurin luktar og smakkar illa. Orsøkin til, at fiskakeyparin ikki vil keypa upsa, sum veiddur er á fjørðinum, er, at fiskurin livur av laksafóðuri, sum fellir frá alingini - og frá skarni frá laksi. Trupulleikin er ikki ókendur millum norskar fiskakeyparar, men vísir seg at vera størri í ár enn áður. Tor Bernhard Harestad, sum rekur fiskamóttøku í Rennesøy, er millum teirra, sum ikki vilja keypa upsa, ið er veiddur á fjørðinum. - Upsin er mislitaður, feitur, og kjøtið í fiskinum hongur ikki saman, men minnir meira um deiggj. Fiskakeyparin sigur, at magainnihaldið sigur, hvat fiskurin etur, og her er einki at fara skeivur í. - Føðin er laksafóður, sum fellir fra alingini og skarn, sum fellir frá laksinum, sigur hann.

# At royna nýggjar leiðir og lin



### Umbering

Av misgáum kom bara onnur síðan (25) við í blaðnum í gjár um tilmælið hjá Fiskirannsóknarstovuni um fiskidagar fyri komandi fiiskiár. Tí prenta vit greinina umaftur í dag - í heilum líki. Ein onnur síða í blaðnum »snýkti« seg samstundis inn á tvær síður.

Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

**Blaðm.**

**- Tað er eingin einføld loysn á trupulleikunum, nú botnfiskastovnarnir undir Føroyum eru so illa fyri. Givið er, at skulu tiltøk muna nakað, koma tey at merkjast í føroyskari fiskivinnu og samfelagnum annars, sigur Fiskirannsóknarstovan í sínum tilmæli til landsstýrismannin**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*Vilmund@sosialurin.fo*

Fiskirannsóknarstovan hevur latið fiski- og tilfeingismálaráðnum sítt tilmæli um fiskiskap undir Føroyum fyri komandi fiskiár. Hetta er ein av uppgávunum, sum stovnurin hevur sambært lógini um vinnuligan fiskiskap.

Ítøkiligu tilmælini hjá Fiskirannsóknarstovuni eru níggju punktum. Tilmælini eru hesi:

a) Fiskidagatalið hjá línuskipum, útróðrarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 Hk (bólkur 3, 4 og 5) verður minkað við 50%.

b) Fiskidagatalið hjá partrolarum (bólkur 2) verður minkað við 20%.

c) Eingin serlig toska-og hýsukvota verður latin skipabólkum uttan um dagaskipanina. Í staðin verður sett ein mest loyvd hjáveiða av toski og hýsu uppá 3% (í vekt fyri hvønn túr sær). Hetta eigur ikki at vera galdandi fyri fiskiskap á Føroyar/ Íslandsryggin-um.

d) Eingin vinnuligur fiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka grynri enn 200 m.

e) Serligu gýtingarfriðingarnar fyri tosk á landgrunninum og upsa undir Føroyum halda fram.

f) Eingin vinnuligur fiskiskapur við húki eigur at verða loyvdur innan fyri 3 fjórðingar úr landi, og til toska-og hýsustovnurin eru komin fyri seg aftur eigur heldur eingin vinnuligur fiskiskapur at verða loyvdur á leiðunum vístar í skjali 1.

g) Økini e og m verða stongd fyri trolfiskiskapi alt árið.

*Fiskirannsóknarstovan mælir til, at eingin vinnuligur fiskiskapur við húki verður loyvdur innan fyri tríggjar fjórðingar úr landi – og bert bátar, ið reka vinnuligan fiskiskap eiga at sleppa at avreiða*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Lagaligari roynd gevur nógvar fyrimunir

**- Við harðari roynd verður fiskiskapurin góður, tey árini tilgongdin er góð. Men samstundis verður lítið og einki eftir til árini, tá tilgongdin ikki er góð, sigur Fiskirannsóknarstovan**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sínum tilmæli til landsstýrismannin, Tórbjørn Jacobsen, vísir Fiskirannsóknarstovan á, at tað, at veiðitrýstið eigur at minka, er ikki tað sama sum, at veiðan fer at minka.

- Um veiðitrýstið verður minkað, kemur tað at merkja veiðina ta fyrstu tíðina, kanska í eitt til trý ár. Eftir hetta kann væntast, at veiðan í tonsum sum heild verður hin sama, men at færri og størri fiskar verða veiddir.

Fiskirannsóknarstovan heldur, at hetta hevur fleiri fyrimunir. Stórur fiskur er betur egnaður í gýtingar-